# Bygdaráðsfundur

## Bygdaráðsfundur hin 16.04. 2012

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Bygdaráðssalurin | |
| Hjástødd vóru: | Símin Johannesen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Johannus Danielsen | x |
| | Peddy Højgaard | x |
| | Petur J. Petersen | x |
| | Jákup M. Kjeld | |
| | Alfred Olsen - ref. | x |

**Mál nr. 52/2012 Fíggjarmál**
J. nr. 2012-0011-0030
Roknskapurin hjá Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi er komin til ummælis hjá Nes kommunu.
Fundarfrásøgn og roknskapurin eru viðløgd.
**Mentanarnevndin mælir til at góðkenna roknskapin hjá Eysturoyar Røktar- og Ellisheimið fyri 2011, soleiðis sum hann er uppsettur.**
**Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja roknskapin 2011, og tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.**
**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 53/2012 Mentamál**
J. nr. 2012-0019-0032
Føroya Klarinettorkestur søkir um stuðul til ferð til Kroatien frá 3. til 11. august 2012. Tey søkja um kr. 2.500,00.
Frá Nes kommunu luttekur Annika í Jákupsstovu.
**Mentanarnevndin mælir til at stuðulin 2.500,00 kr. verður latin gjøgnum Nes sóknar Musikkskúla. Musikkskúlin hevur møguleikar at lata stuðul til næmingar til slík tiltøk.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilráðingini hjá Mentanarnevndini, og at søkt verður til Nes sóknar Musikkskúla um fíggjarligan stuðul..**
**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 54/2012 Kommunumál.**
J. nr. 2012- 0001-0006
Samb. Kunngerðarblaðið nr. 26 frá 23. mars 2012, skal fólkaatkvøða um kommunusamanleggingar vera hin 3. mai 2012.

Mentanarnevndin skal taka støðu til spurningin, um øll val í framtíðini ikki skulu fara fram í fimleikahøll skúlans, har gott pláss er og atkomumøguleikarnir eru góðir, eisini fyri tey í koyristóli.
Formaðurin í valnevndini hevur sagt gott fyri fimleikahøllini sum valstað í Nes kommunu.
**Mentanarnevndin mælir til, at fimleikahøllin framyvir verður valstað hjá borgarunum í Nes kommunu.**
**Hetta skal tó ikki ávirka skúlagongdina í Tofta skúla.**
**Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 55/2012 Vegamál</u>**

<u>J. nr. 2012-0045-0004</u>

Nú fleiri hallir eru bygdar á ídnaðarøkinum í Oyrunum og við Rætt, verður neyðugt at umhugsa veganavn og húsanr á staðnum.
Í Oyrunum skulu húsanr. Broytast soleiðis, at Turkihúsið fær nr. 12 og KBH nr. 14.
**Tekniska nevnd mælir til, at navnið verður "Við Rætt".**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd samtykt.**

**<u>Mál nr. 56/2012 Umhvørvismál</u>**

<u>J. nr. 2012-0044-0055</u>

Eigari av matr.nr. 65-66 Nes hevur ein fyrispurning til Nes kommunu um atkomu møguleikar til húsini niðri á For.
Ætlanin er at kunna parkera bilar oman fyri húsini og er víst á tekning hvussu hetta kann gerast, men her er ikki nógv pláss.
Verandi gøta frá Neshamar og út í Forna, gongur har ætlaða bilstøðið skal vera, so skal nakað parkeringøki verða her, so má hetta koma niðan í gøtuna.
**Tekniska nevnd hevur staðfest, at gamla bygdagøtan frá Neshamri og út í Forna, ið gongur fram við húsunum á For, er løgd inn í matrikkulin, og tað viðførir, at parkeringsøki ikki kann gerast niðan í gøtuna, uttan so er, at bygdaráðið o.o. fyrst taka undir við og samtykkja, at gera tað broyting í matriklinum, at ásetingin um hesa aldargomlu bygdagøtuna verður tikin burtur á hesum strekkinum.**
**Tekniska nevnd metir tað vera rættast at henda gamla bygdagøtan verður varðveitt í matriklinum, og mælir tí frá at geva loyvi til at gera parkeringøki niðan í gomlu bygdagøtuna niðri á For.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr.  57/2012 Havnamál**
J. nr. 2012-0003-00019
Hin  21.03.2012 søkir havnafútin um farloyvi í 1 ár frá 1. August at rokna.
**Tekniska nevnd mælir til, at havnafútin fær farloyvi i eitt ár, frá 1. August 2012 og til 1. August 2013.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr.  58/2012 Tekniskt mál**
J. nr. 2008-0048-0044
Í skrivi dagfest 30.03.2012 søkir SEV um loyvi til at broyta fundamentini til vindmylluna undir Vørðuni og til vindmylluna sunnanfyri Vøruvatn í sambandi við, at teir ætla at seta 2 nýggjar Enercon E44 (sama slag sum tær á Eystnesi) vindmyllur upp í staðin fyri tær verandi, men at taka tað sunnastu vindmylluna, sum datt niður, burtur og rudda økið. Ein grund fyri hesum er, at sjálvt um veingjaspennið á hesum nýggju vindmyllunum er nakað minni, 44 metrar í mun til 47 metrar, so larma tær nakað meira, og tí verða bert 2 nýggjar vindmyllur settur upp í staðin fyri tær verandi 3, ið  hava staðið frammanundan, so ljóðkrøvuni verða hildin.
**Tekniska nevnd mælir til at játta SEV loyvi til at seta tær 2 nýggju vindmyllunum og gera neyðugar broytingar í fundamentinum, við teimum treytum sum kommunan hevur ásett fyri galdandi vindmyllur.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr.  59/2012 Tekniskt mál**
J. nr. 2008-0048-0044
Í samband við at 3 nýggjar vindmyllur afturat vera settar upp í Nes haga í ár, verður neyðugt at leggja 2 háspenningarkaðlar til økið.
Og í skrivi dagfest 24.02.2012 søkir SEV um at fáa loyvi til at grava fyri hesum háspenningskaðalum gjøgnum hagan, frá krossinum har Agnið kemur í Æðuvíkarvegin, og niðan til lítlu vindmylluna og harfrá oman til Æðuvíkar. (SEV hevur eisini søkt um at leggja háspenningarkaðal frá Rituvíkshálsi og til krossin Agnið-Æðuvíkarvegur.)
Kort ið vísur hvar grivið verður, er viðlagt.
Búnaðarstovan hevur sent hetta til ummælis hjá Nes kommunu.
**Tekniska nevnd mælir til at játta SEV at legga kaðalin samb. umsóknina, frá vegamótinum Agnið-Æðuvíkarvegur, í beinari linju**

**gjøgnum hagan til norðastu vindmylluna og harfrá gjøgnum hagan í beinari linju til Æðuvíkar.**
**Viðmælið frá Teknisku nevnd samtykt.**

**Mál nr. 60/2012 Tekniskt mál**

J. nr. 2008-0048-0044

Í skrivi dagfest 09.03.2012 søkir SEV um loyvi til at leggja kaðalar frá Rituvíkshálsi til vegamótið við Agnið.
Ætlanin hjá SEV er at leggja tveir háspenningarkaðalar á 20 kv frá Kráargil og fram við Æðuvíkarvegnum til vegamóti Agnið.
Landsverk hevur givið loyvi til hetta við skrivi dagf. 06.03.2012, treytað av, at grøvin verður grivin eina 25 metrar eystan fyri Æðuvíkarvegin, tí Landsverk ætlar at breiðka Æðuvíkarvegin. Landsverk skal hava eftirlit við hesum arbeiðið.
Búnaðarstovan hevur sent hetta til ummælis hjá kommununi.
**Tekniska nevnd mælir til at játta SEV at legga kaðalin samb. umsóknina, og eftir treytum frá Landsverk, uml. 25 metur eystan fyri Æðuvíkarvegin, og um hetta letur seg gera, at kommunurnar so fáa loyvi til at leggja nýtslukaðalin til moldgoymsluna ovari í kaðalgrøvina hjá SEV.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 61/2012 Tekniskt mál**

J. nr. 2012-0044-0056

Í skrivið dagfest 13.03.2012 søkir Landsverk um loyvi til at keypa lendi burtur av Nes haga 155a.
Ætlani er at gera smávegis breiðkingar á vegnum til Æðuvíkar, norður frá krossinum Agni-Æðuvík, har vegurin verður breiðkaður á báðum síðum niðan til svingið, har vegurin verður breiðkaður vestureftir, so vegurin verður tveysporaður niðan á Skorðhæddina.
Ætlanin erat breiðka vegin í 4 støðum, við 3 metra breidd og 10-15 metra longd frá ídnaðarøkinum á Rituvíkarhálsi og niðan á Skorðhæddina.
**Tekniska nevnd mælir til, at Landsverk fær loyvi til at ogna sær neyðugt lendi til breiðkan av Æðuvíkarvegnum.**
**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 64/2012 Byggimál**
J. nr. 2007-0021-0013
Uppskot eru komin um nýggj vindeygu, til Tofta skúla. Støða skal takast til vindeyguni, so hesi kunnu skiftast út í summar.
**Tekniska nevnd metir hetta vera eitt mál fyri valdu bygginevndina til at viðgera málið.**
**Allir partar í málinum eiga at verða kallaðir til fund, skjótast gjørligt, at taka støðu til nýggju vindeyguni.**
**Bygdaráðið samtykti at kalla allar partar til fund í skúlanum, til at viðgera nýggju vindeyguni.**

**Mál nr. 65/2012 Havnamál.**
J. nr. 2012-0046-0055
Kommunan hevur tikið avgerð um, at kommunan ger eina atløgusíðu vestan fyri Saltsøluna inni á Rætt.
**Tekniska nevnd mælir til, at bryggjan verður boðin út.**
**Bygdaráðið samtykti at tosa við Teknistovuna um, at teir innheinta tilboð uppá kajuna, frá J&K Petersen og Articon, og at avtalaður prísur fyri eftirlitið, verður gjørdur millum Teknistovuna og Nes kommunu.**

**Mál nr. 66/2012 Trivnaðarmál**
J. nr. 2012-0019-0031
Forlagið Hellurnar er farið undir at gera trivnaðarkanning av teimum umleið 1800 føroyingunum, sum eru uttan arbeiði.
Í hesum sambandi verður søkt um kr. 5.000,00 í stuðli, fyri at viðgera Nes kommunu serstakt.
**Trivnaðarnevndin mælir frá at veita stuðul til forlagið Hellurnar, til hesa kanningina, tí sjálvt um nevndin ynskir at trivnaðurin er so góður sum gjørligt, metir nevndin hetta vera eina uppgáva hjá Arbeiðsloysisskipanini at fáa kanna.**
**Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.**
**Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**